## Misnýtarar fáa skúr

**Reyði Krossur Føroya hevur í samstarvi við Tórshavnar Býráð syrgt fyri, at ein bjálvaður skúrur verður settur upp á Skálatrøð, sum rúsdrekkamisnýtarar og heimleys kunnu halda til í um dagin**

HEIMLEYS
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað hevur leingi verið ein trupulleiki hjá stovnunum á Debesartrøð, at nógvir rúsdrekka-misnýtarar hava fingið sær tilhald í økinum, og hetta hevur verið til stóran ampa fyri stovnarnar og viðskiftafólk.

Hetta fekk fyrr í ár Reyða Kross at venda sær til kommununa við einum uppskoti um loysn á trupulleikunum. Reyði Krossur hevur keypt ein arbeiðsskúr upp á 21 fermetrar, sum er bjálvaður og hevur innlagt vatn og WC, og felagsskapurin hevur heitt á kommununa um at fáa loyvi til at seta skúrin upp á Skálatrøð.

### Royndartíð upp á tvey ár

Uppskotið hjá Reyða Krossi var, at skúrurin skuldi setast upp í eini royndartíð upp á tvey ár, og hesum hevur býráðið tikið undir við. Málið hevur verið fyri bæði í sosialu nevnd og í byggi- og býarskipanarnevndini, har tað varð endaliga samtykt mánakvøldið.

Suni Vinther, formaður í Reyða Krossi Føroyar, sigur, at felagsskapurin leingi hevur havt eitt ynski um at veita hesum fólkum, ið ganga fyri vág og vind, eitt slíkt skjól, og hann fegnast um, at býráðið hevur tikið undir við uppskotinum. Hann sigur seg vóna, at tað fer at bera til at seta skúrin upp í hesi vikuni.

# Norrøna í dokk




*Eitt brek á stabilisatorunum í stýriborð hevur við sær, at Norrøna noyðist í dokk í Fredericia í eina viku í september mánað*
*savnsmynd*

**Síðst í komandi mánað fer Norrøna í dokk í eina viku. Orsøkin er tann, at stabilisatorarnir stýriborðsmegin hava ikki virkað til fulnar í summar**

FERÐAMANNA-SIGLING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Nú vetrarsiglingin nærkast og harvið meiri baldrut veður, skal Norrøna í dokk at fáa stabilisatorarnar umvældar.

### Eingin vandi

Hóast stabilisatorarnir ikki hava virkað til fulnar í summar, er hetta ikki nakað, ið ferðafólkini hava merkt, tí veðrið hevur verið so mikið gott í summar.

At brek hevur verið á stabilisatorarnar, hevur ikki havt nakra ávirkan á trygdina umborð á Norrønu, tí stabilisatorarnir eru bert til fyri komfortina hjá ferðafólkunum.

Á høvuðsskrivstovuni hjá Smyril Line verður upplýst, at Norrøna verður tikin úr sigling 24. september, og hon kemur aftur í sigling eina viku seinni, tann 1. oktober. Umvælingarnar verða gjørdar á skipasmiðjuni í Fredericia.

Hesa vikuna, ið Norrøna er í dokk í Fredericia, verður eingin ferðafólkaflutningur sjóvegis, men Smyril Blue Water, ið stendur fyri farmaflutninginum, fer at leiga eitt skip, ið kann taka sær av farminum, soleiðis at bæði inn- og útflytarar ikki fara at verða nervaðir av hesum, verður upplýst hjá Smyril Blue Water.

# Samkynd viðgjørdu trúarspurningar

**Týsdagin varð spurt á ANSO-ráðstevnuni, um samkynd kunnu vera trúgvandi. Ein av niðurstøðunum var, at tað er týdningarmiklari at gera tað, ið er gott enn tað, ið er rætt**

SAMKYND
*Theodor E. D. Olsen*



*Britta Svensson og Arthur Thiery*
*Mynd. J. K. Vang*

Síðani ANSO-ráðstevnan, sum lesandi samkynd skipa fyri í Norðurlandahúsinum í hesum døgum, fór av bakkastokki, er kjakið um samkynd og átrúnað rættiliga kyknað.

Ikki færri enn tveir samgongulimir, har annar er landsstýrismaður, hava ávarað ímóti at føroyingar hýsa slíkum tiltøkum. Felags fyri grundgevingarnar hjá báðum politikarum er, at teir taka støði í Bíbliuni. Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður, skrivar m.a. í lesarabrævi í gjár, at "Bíblian er púra greið á hesum øki og ávarar harðliga ímóti slíkum livihátti".

Javnaðartingmaðurin Gerhard Lognberg mótmælti somuleiðis í blaðnum í gjár ímóti at, at Hans Pauli Strøm hevði sett ANSO-ráðstevnuna. Hann endurgav brot úr Rómverjabrævinum og samanbar Føroyar við støðuna í Sódomu og Gómorru á sinni.

Men tað tykist, sum tað finnast fleiri enn tann eini hátturin at lesa og ikki minst tulka Halgubók.

ANSO-ráðstevnan setti nevniliga allan týsdagin av til at viðgera spurningin, um samkynd kunnu vera trúgvandi. Dagurin byrjaði við, at tann virðislønti norski dokumentarfilmurin "BE - skitne, syndige me" varð vístur. Filmurin snýr seg um ein 20 ára gamlan drong, sum kallaði seg kristnan, men tók lívið av sær sjálvum, av tí at hann ikki tordi at fortelja sínum næstringum, at hann var samkyndur.

Eftit hetta hildu tey bæði Britta Svensson og Arthur Thiry tveir fyrilestrar um mannarættindi og um at sameina sín átrúnað við sína kynsligu orientering. Tey luttóku bæði sum umboð fyri svenaska felagsskapin EKHO, ið er stytting fyri "Ekumeniska grupperna för kristna homo- och bisexuella". Orðið økumeni kann umsetast sum alkirkjuligt ella felagskirkjuligt, og verður ofta brúkt, har kirkjur samstarva tvørturum samkomumørk.

Arthur Tiery starvaðist sum prestur í baptistasamkomu í nógv ár, til hann í 1996 varð koyrdur frá, av tí at hann viðgekk, at hann var samkyndur. Sjálvur sigur Arther Tiery, at hevði hetta hent eftir 1999, hevði hann havt møguleika at stevnt hesi kirkjuni, av tí at nýggj lóg um trúarsamfeløg kom í gildi tá. Svenska fólkakirkjan loysti frá statinum - ella staturin loysti frá kirkjuni - í 2000.

Arther Tiery er eisini forseti í The European Forum of Gay and Lesbian Christian Groups. Britta Svensson arbeiðir sum sjúkrarøktarfrøðingur innan psykiatri, men er eisini diakonur ella hjálparprestur.

### Heldur tað góða enn tað rætta

Nakað av fólki hevði leitað sær í Norðurlandahúsið týsdagin, m.a. tveir flokkar úr Hoydølum, og bíbliufatanin hjá teimum báðum fyrilestrahaldarunum var púra greið. Tey løgdu dent á, at tey ikki mettu at vit komu víðari við kjakinum um samkynd, um vit halda fram við at leggja størsta dentin á ávís skriftstøð. Tey hildu tað vera av størri týdningi, at ístaðin fyri at kjakast, hvat er rætt og rangt, eiga vit heldur at tosa um, hvat er gott og ilt.

Sjálv argumenteraðu tey við dømum úr Bílbliuni, har lærusveinarnir hjá Jesusi slitu øks ein hvíludag, og hetta hóvaði ikki farisearunum. Men Jesus segði hetta vera í lagi, tí lærusveinarnir vóru svangir, og Jesus var harri hvíludagsins. Somuleiðis var líknilsið um tann miskunnsama sámariubúgvan havt á lofti, har sámariubúgvin vísti størri goodwill fyri einum neyðardýri enn bæði ein prestur og levitur gjørdu.

Niðurstøðan hjá Brittu Svensson og Arthur Thiery var sostatt, at tað er týdningarmiklari hjá kristnum fólki at gera tað "góða" enn tað "rætta".

Røðararnir gjørdu eisini mun á hugtøkum sum ringari samvitsku og skomm. Tey grundgóvu fyri hesum við at siga, at meðan tann ringa samvitskan er nakað, sum bilgist í fólki, verður skommin ofta brúkt samfelagsliga til at seta fólk upp á pláss við.

Tey bæði umboðini frá EKHO greiddu eisini frá, at tann svenska kirkjan alment byrjaði at viðgera spurningar um samkynd í 1971.

Manijeh Elsa Modi, sum samskipar ANSO-ráðstevnuna í Norðurlandahúsinum, sigur við Sosialin, at tað ikki var av tilvild, at hesin eini dagurin á ráðstevnuni var settur av til at viðgera trúarspurningar, av tí at tað í Føroyum so at siga altíð eru átrúnaðarligar argument, sum verða brúkt, tá mælt verður frá at seta lógir í gildi, sum staðfesta rættindi hjá samkyndum.